

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 03 - 2012

# Eivør syngja fyri Stoltenberg

Norski forsætisráðharrin Jens Stoltenberg kemur á vitjan í Føroyum 17. og 18. mai. Hetta skrivar grønlendska blaðið Sermitsiaq. Í hesum sambandi verður skipað fyri stórum hátíðarhaldi í Norðurlandahúsinum 17. mai, sum er norski tjóðardagurin. Har fer m.a. Eivør Pállsdóttur at syngja fyri norska gestinum, sum vitjar okkara oyggjar fyri fyrstu ferð. Ein kann siga, at talan er um eina vitjan í kjalarvørri víkinga, har hann fyrst leggur leiðina til Hetlands, síðani Føroyar og loksins Grønlands. Stoltenberg endar sína ferð við at luttaka á NATO fundi í USA. Sambært grønlendska blaðnum Sermitsiaq kemur Jens Stoltenberg til Nuuk 18. mai, har hann skal hitta grønlendska landsstýrisformannin, Kuupik Kleist. Teir báðir fara eisini saman til innlandsísin fyri at tosa við veðurserfrøðingar frá lærda háskúlanum í Grønlandi, Ilisimatusarfik. Norski forsætisráðharrin fer undir vitjanini eisini at vitja norrønu búsetingarnar í Suðurgrønlandi. Tað hevur ikki eydnast at fáa nakað at vita um vitjanina hjá norska forsætisráðharranum í Føroyum annað enn, at stórt hátíðarhald verður hildið í Norðurlandahúsinum 17. mai, men má roknast við, at hann fer at hitta umboð fyri landsstýrið at tosa um bæði fiskivinnu- og oljusamstarv. Norska oljufelagið Statoil fer í summar undir størstu boriverkætlanina í Føroyum nakrantíð. Tað kann tí hugsast, at norski forsætisráðharrin, sum eitt tíðarskeið var norskur oljumálaráðharri, eisini fer at tosa um við føroyskar politikarar og myndugleikar um oljuvinnusamstarv millum londini. Undir vitjan síni í Hetlandi fer norski forsætisráðharrin at lata upp eitt nýtt museum í Scalloway til minnis um slóðbrótandi arbeiðið, ið hetlendingar gjørdu fyri at hjálpa norðmonnum undir seinna heimsbardaga.